# Vitan & Vøkstur

Yvirskipaði granskingarpolitikkur Føroya 2011-2015



Framløga 18.2.2011

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

# Føroya Vísindaráð

- Stovnsett við løgtingslóg 4.5.2006. Endamálið: At skapa karmarnar og bygnaðin fyri einum politikki, ið skal verða eitt týðandi strategiskt samfelagsmenningaramboð
  - § 2a: "Føroya Vísindaráð orðar yvirskipaða granskingarpolitikk Føroya við felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan."
  - § 6, stk. 6: Granskingarnevndin skal: "ráðgeva og verða Føroya Vísindaráði til hjálpar í arbeiðnum at orða yvirskipaða granskingarpolitikkin."



- Limirnir formliga tilnevndir í juli 2008

# Arbeiðið við politikkinum

- Fyrsti fundur í Vísindaráðnum 28.11.2008
- Granskingarnevndin gjørdi eftir áheitan fyrsta uppskot til politikk, viðgjørt av Vísindaráðnum 23.2.2009
- Nógv samskifti og fleiri fundir í Granskingar-nevndini, Vísindaráðnum og fyrisitingarliga um og rundanum politikkin
- Endaliga uppskotið samtykt og undirskrivað á fundi 28.1.2011



# Fyrsti granskingarpolitikkurin

- Tekur støði í verandi umhvørvi og viðurskiftum, samstundis sum ein røð av tilmælum og álitum eru tikin við í viðgerðina
- Hevur yvirskipaðar orðingar um ætlanir og dreymar - viðurskifti, sum breið semja er um, men sum ikki hava verið orðað felags fyrr og sum krevja stór tøk fyri at vera sett í verk
- Ásetir ikki ítøkilig stig ella mál, t.d. játtan ella lógarbroytingar. Hetta kemur í sjálvstøðugum arbeiði við yvirskipaðum raðfestingum og politiskari arbeiðsætlan



# Politikkur í fýra pørtum

- Inngangur
  - staðfest, at gransking er av avgerandi týdningi fyri at menna okkara mentan og samfelag
  - endamálið er at búgva Føroyar til nútíð og framtíð
  - skulu byggja brýr um gjónna, ið er millum ynski, dreymar og framsøkni øðrumegin, og veruleikan hjá einari smátjóð hinumegin
- Styrktir karmar fyri føroyska gransking
- Dygg og støðug granskingarfígging
- Raðfesting av granskingarøkjum



# Styrktir karmar fyri føroyska gransking

- Styrkja umhvørvið og savnast um Fróðskaparsetrið
- Skapa felags karmar og sam-starva á øllum hugsandi økjum
- Gagnnýta altjóða sambond okkara og gera raðfestingar í mun til altjóða møguleikar
- Eggja vinnuni at granska við at seta skipanir í verk
- Fáa til vega og greina hagtøl



# Dygg og støðug granskingarfígging

- Langtíðar avtalur um karmar fyri í minsta lagi trý ár
- Allar kappingarjáttanir samskipast og fyrisitast einsháttað
- Miðvíst skipa og styrkja almennu játtanina til gransking, menning og nýskapan
- Øking av kappingarjáttanum savnast í Granskingargrunninum, samstundis sum stovnarnir verða styrktir



# Raðfesting av granskingarøkjum

- Velja kjarnuøki útfrá møguleikanum fyri ávirkan og virkni
- Landsstýrið raðfestir í samráði við Vísindaráðið og eftir tilmæli frá Granskingarnevndini í mesta lagi 5 økir
- Raðfestingin skal speglast í játtanunum til granskingarstovnarnar og til Granskingargrunnin
- Raðfesting dagførd triðja hvørt ár



# Ger politikkurin mun?

- Arbeiðið við politikkinum hevur mýkt meiningar og flutt mørk
- Breið semja er staðfest um, at vit mugu gera íløgur í gransking, menning og nýskapan, fyri at kunna menna okkara mentan og samfelag, og víðari, hvussu hesar íløgur skulu gerast
- Politikkurin gevur neyðugu heimildirnar og karmarnar til framhaldandi arbeiðið

